# HEILSANIR



Røsk vart tú eisini



**Góða Mina**
Hjartaliga tillukku við teimum 45 árunum. Ja mín kjera, nógv vatn er runnið, og ofta hevur mótin skift øll hesi árini, bæði so og so. Men ikki sæst tað á tær :-)
**Ynskja partygellurnar**



Ikki sæst tað á tær



Hjartaliga tillukku við føðingardegnum



**Góði Andreas**
Hjartaliga tillukku á 11 ára degnum 9. apríl og alt tað besta í framtíðini. Tú ert tann besti stóribeiggin.
Vit elska teg.
**Heilsan mamma, babba, Aron, Eli og Jónas**



**Góða Teresa og Jonna**
Vit ynskja tykkum hjartaliga tillukku við 7 og 11 ára døgunum. Vit elska tykkum.
**Kærar heilsur mamma, babba og Sámal**



Einaferð vart tú ung og grøn


Sosialurin *Heilsanir* kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á míðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur: ______________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ______________________________

Bústaður: ______________________________

Bygd/býur: ________________ Tlf.: __________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:

Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<



## Vágs skúli

# Varaskúlastjórastarv í Vágs skúla

Starvið sum varaskúlastjóri í Vágs skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2008.

Í Vágs skúla eru uml. 230 næmingar í 1.-10. flokki, og 26 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøki er undir mentamálaráðnum við fyribilstænastu í Vágs skúla. Tann, ið sett/settur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmáráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, sum sett/settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi 24. apríl 2008 kl. 10:00.**

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til Óla í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 373192 ella 222896.

*Vágur 8. apríl 2008*

**Vágs skúli**
Vágsvegur 32
900 Vágur